# Leiðbeining til lærarar

# Munnlig próvtøka í føroyskum á A-stigi

| | |
|---|---|
| **Øki:** | Kjarnaøki, tema, tekstslag ella annað viðkomandi sambært undirvísingarfrágreiðingum. |
| **Tilfar:** | Ólisið tilfar. Høvundur, heiti, árstal og annað viðkomandi. |
| **Próvtøku-spurningur:** | Í próvtøkuspurninginum skal greitt koma fram, at próvtakarin skal greina, tulka og seta ólisna tilfarið í frásjón í mun til lisið tilfar.<br><br>Leiðbeinandi spurningar, sum t.d. biðja próvtakaran leggja dent á nakað ávíst í greiningini ella vísa á ávíst lisið tilfar í frásjónargerðini, kunnu vera. Havast má tá í huga, at leiðbeinandi spurningar ávirka torleikastøðið á próvtøkuspurninginum og harvið eisini heildarmetingina av avrikinum hjá próvtakaranum. |

**Úr námsætlanini**

Próvhoyringin varir 30 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er 60 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og vegleiðing.

Próvtakarin verður próvhoyrdur í ólisnum tilfari, sum í tema ella á annan hátt er knýtt at evnum, økjum o.tíl., sum arbeitt hevur verið við í undirvísingini.  Tilfarið, sum í mesta lagi skal vera 8 normalsíður ella samsvarandi tí, skal greinast og tulkast í mun til viðgjørd evni, umframt at verða sett í frásjón. Próvhoyringin er ein faklig samtala millum próvtakara og próvhoyrara, og tekur samtalan støði í framløgu próvtakarans av tilfari og próvtøkuspurningi, sum próvtakarin hevur arbeitt við í fyrireikingartíðini.

Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur tey mál, sum eru sett í lærugreinini. Próvtakarin skal við støði í einari fakligari tilgongd sýna evni sjálvstøðugt í neyvum og fjølbroyttum máli at leggja fram og viðgera tilfar við støði í próvtøkuspurningi/um. Hann skal sýna, at hann dugir at taka fram týðandi tættir í tilfarinum, seta teir í samband við tættir í undirvísningini og seta próvtøkutilfarið í frásjón. Próvtakarin skal duga at nýta føroyskfakliga vitan og faklig háttaløg í lærugreinini.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.